# Janus Rasmussen - lítillátin & garvillur!


– Okkara fyrsta mál er at vinna eina award, sigur ein skemtandi Janus Rasmussen úr Lama Sea. Hann greiður frá, at bólkurin ætlar at spæla so nógv sum til ber og harvið gerast betur. Teir hava ikki nakrar beinleiðis ætlanir um at taka eina fløgu upp í løtuni

Mynd: Henning Nicodemussen

**Janus Rasmussen er ein av teimum, sum hevur møguleikan at vinna fleiri heiðurslønir á stóra galla tiltakinum »Planet Awards«. Besti sangari, besti bólkur og besti nýggi bólkur eru tær heiðurslønirnar, sum Janus og hansara Lama Sea hava møguleika at fáa í sekkin**

PLANET AWARDS

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Vit sum kenna bólkin Lama Sea vita, at teirra tónleikur umboðar tað, sum danir kalla »fest og ballade«. Men teir eru eisini frálíkir tónleikarar, ið spæla krevjandi tónleik, sum við vissu fær áskoðarar uppá kók. Á palli geva Lama Sea so nógva orku frá sær, at tú sum áhoyrari verður drigin við inn í teirra litríka alheim, og tað er ikki minst einum manni at takka. Janus Rasmussen, sangari í Lama Sea, er avgjørt tann miðsavnandi á pallinum, tá ið Lama Sea spæla. Hann gevur áskoðarunum nakað eyka - hann gevur teimum eina veldiga uppliving av orku, pínu og gleði. Hann syngur væl, hann er energiskur, hann sær gott út, altso hann er hin fullkomni frontfigururin.

### Sangarin

Fyri at skapa eina greiðari mynd av Janus Rasmussen sum sangara og tónleikara, fingu vit okkum eitt prát við hann. Spurdur um, hvussu hann sjálvur vil lýsa seg sum sangara, greiður Janus soleiðis frá.

_ Eg havi ongan serligan sangstíl. Eg royni at halda meg leysan frá øllum stílum og genrum og vil bara vera opin fyri tí, sum klæðir tónleikinum, greiðir Janus frá.

Vit sum hava upplivað Janus Rasmussen á palli, hava lagt til merkis, at hansara stílur er heilt øðrvísi enn stílurin hjá øðrum føroyskum sangarum. Hann hevur eina ótrúliga breiða rødd - hetta skal skiljast á tann hátt, at hann meistrar tað lága og tað høga. Vit hoyra hann ofta skríggja við tí hvøssu falsettrøddini. Men tað sum blaðmaðurin metir vera sereyðkenni hjá Janus Rasmussen sum sangara, er hansara bretska úttala. Hansara úttala minnir um sangarar sum Damien úr Blur, meðan hansara kátu skríggj minna um soul meistaran Little Richard.

Janus fortelur okkum, at hann ongantíð veruliga hevur fingið frálæru í sangi, men tó so hevur hann saman við teimum flestu í Lama Sea manningini, tónleik á hástigið í studentaskúlanum.

Janus er tilnevndur í greinini »Besti sangari«, og vit spurdu hann, hvussu hann kendi seg í samlag við Kim Hansen, Kára Sverrisson, Brandur Karlsson Jacobsen og Teitur Lassen.

– Hmmm, eg kenni meg rættiliga lítlan við síðuna av teimum. Hetta eru stór nøvn, sum hava prógvað sítt virðið, sigur ein lítillátin Janus Rasmussen.

Prátið fall eisini inn á hansara útsjónd.

– Tað er altso ikki eg, sum eri pretty boy í Lama Sea, sigur Janus skemtiliga.

– Tað er ein annar, sigur hann nokkso opið og loyvir okkum øðrum at gita, hvør tann rætti pretty boy er í Lama Sea.

### Besti bólkur

Lama Sea eru eisini tilnevndir sum besti bólkur, men eisini her er kappingin sera hørð. Hinir bólkarnir eru 200, Makrel, Marius og Go Go Blues eru kappingarneytarnir hjá Lama Sea. Men hvussu vil Janus lýsa tónleikin hjá Lama Sea?

Janus fortelur, at Lama Sea er ein frískur nýggjur bólkur, sum spælir ein øðrvísi tónleik, enn vit eru von við her í Føroyum. Hann heldur, at tónleikastílurin hjá Lama Sea er eitt bland av ymiskum genrum, so tað er ikki so einfalt at geva tónleikinum eitt navn. Allir í bólkinum lurta eftir ymiskum sløgum av tónleiki, og sostatt fáa teir einstaki limirnir íblástur úr ymiskum genrum. Hetta gevur tónleikinum eitt spennandi krydd, metir Janus Rasmussen.

Men hann vísir eisini á, at hinir bólkarnir í hesi tilnevningini eru sera feitir, so hann er heldur ivasamur um møguleikarnir hjá Lama Sea at vinna heiðurslønina fyri besta bólk.

### Og hvat so?

Av tí at Lama Sea er ein rættiliga nýggjur bólkur, so er tað eisini upplagt at práta leysliga um framtíðarætlanirnar hjá bólkinum.

– Okkara fyrsta mál er at vinna eina award, sigur ein skemtandi Janus Rasmussen. Hann greiður frá, at bólkurin ætlar at spæla so nógv sum til ber, og harvið gerast betur. Teir hava ikki nakrar beinleiðis ætlanir um at taka eina fløgu upp í løtuni.

– Vit fara at útgeva eina fløgu, tá ið onkur vil hava okkum at útgeva eina fløgu, sigur hann. Hann heldur ikki, at tað er ráðiligt at gera eina fløgu bara fyri at gera eina fløgu. Tað skal vera ein ordiligur eftirspurningur, og tónleikurin skal eisini vera klárur til tað. Hann vísur á, at fløgan ikki endiliga skal gerast í Føroyum.

– Vit hava sjálvandi ambitiónir um at gerast fulltíðar tónleikarar, men bólkurin er so mikið nýggjur enn, at vit ikki hava gjørt okkum teir heilt stóru tankarnar um hetta enn, greiður hann frá.

– Fyri okkum er tað umráðandi at vera seriøsir, tá ið tað snýr seg um tónleik. Og hetta er eisini nakað, sum eftirhondini er um at gera seg galdandi í føroyskum tónleiki. Teir bólkar sum arbeiða seriøst við tónleikinum, klára seg eisini betur. Hygg bara eftir teimum bólkum, sum eru tilnevndir í Planet Awards. Hetta er alt bólkar og einstaklingar, sum arbeiða hart og seriøst við tónleiki, og sostatt haldi eg, at vit kunnu siga at tónleikurin hevur tað gott í Føroyum, sigur Janus Rasmussen at enda.